Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Hervør Pálsdóttir, løgtingsmaður

Svarari: Sirið Stenberg, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Heimloysi

Spurningar:

1. Ætlar landsstýrismaður at gera eina heildarætlan fyri at basa heimloysi í Føroyum?
2. Verður tað arbeitt við at fáa hagtøl fyri heimloysi í Føroyum?

Viðmerkingar:
Í vikuni hevur Hagstovan kunngjørt uppgerð fyri gistingar á herbergunum í Føroyum. Uppgerðin vísir, at kømrini á báðum herbergunum vóru upptikin mest sum allar dagar í fjør. Í november var Martin Kúrberg eisini í útvarpinum og greiddi frá, at alsamt fleiri ung í 20'unum gista á Herberginum. Hesi ungu hava oftani havt tilknýti til Kriminalforsorgina og/ella Psykiatriska depilin. Fyri at koma hesum trupulleikanum til lívs er neyðugt at hava eina heildarætlan fyri, hvussu vit skulu basa heimloysi í Føroyum. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 3. mars 2023

Hervør Pálsdóttir